KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 31.01.2019 kl. 17:30
Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Tummas J. Lervig, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen
Varalimir: Kjartan á Gravarbø møtti fyri Beintu Klakstein

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
1/19	19/00228-1	Býráðslimur forfall - Beinta Klakstein
2/19	17/01479-9	Byggisamtykt - víðkan av økisparti B14 í Ánunum - kærufreist úti
3/19	18/00451-5	Byggisamtykt - broyting í ásetingum fyri økispart A18 - kærufreist úti
4/19	18/00556-15	Byggisamtykt - íbúðargrundøkisvídd í økisparti A18 - kærufreist úti
5/19	18/00649-10	Byggisamtykt - økismark flutt millum A18 og B9 - kærufreist úti
6/19	18/01017-5	Byggisamtykt - reguleringar av økinum undir Fossum - kærufreist úti
7/19	18/01337-2	Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 968a í Klaksvík
8/19	19/00100-2	Umsókn um marknaumskipan Oman Reyðhús - matr.nr. 205d og 205e

1/19
19/00228-1 Býráðslimur forfall - Beinta Klakstein

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	31.01.2019	1/19

Frágreiðing um málið:
Beinta Klakstein, býráðslimur, hevur boðað borgarstjóranum frá, at hon er burturstødd í tíðarskeiðinum 29. jan. til 13. feb. og tí ikki fær møtt til býráðsfundin 31. jan. 2019.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, § 18:

Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.
Stk. 3. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar

Fíggjarligar avleiðingar:
Samsýning til tiltakslimin.

Tilmæli:
Býráðið verður at taka støðu til, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

Klaksvíkar Býráð 31. januar 2019
Einmælt samtykt at lata næstvalda á valevnislistanum, Kjartan á Gravarbø, taka sæti fyri Beintu Klakstein.

2/19
17/01479-9 Byggisamtykt - víðkan av økisparti B14 í Ánunum - kærufreist úti

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	21.01.2019	8/19
2 Havna- og Vinnunevndin	21.01.2019	1/19
3 Klaksvíkar Býráð	31.01.2019	2/19

Frágreiðing um málið:
Byggisamtyktarbroytingin – samtykt á býráðsfundi 22.02.2018 - viðvíkandi víðkan av økisparti B14 í Ánunum hevur nú ligið frammi til almenna hoyring. Kærufreistin var úti 21. november 2018.

Í kærutíðin hevur kommunan móttikið eina kæru/viðmerking:
Borgari skrivar soleiðis í viðmerking móttikin 21.11.2018:

Vísandi til lýsing av omanfyri nevndu broyting, skal eg loyva mær at gera vart við at økið millum sjóðarmálan og landsvegin, er tað økið, sum niðursetumenn sum fluttu av Strond inn í Ánirnar í 1840-unum fyrst settu búgv.
Fyrstu húsini í Ánunum vóru bygd norðanfyri Herðina, og er staði undir landsvegnum í dag. Um tað bleiv grivið burtur tá landsvegurin bleiv umlagdur veit eg ikki; men vónandi liggur tað órørt undir vegnum.
Mær er sagt at tey búleikaðust í einum býli niðanfyri, meðan húsini blivu bygd.
Í sambandi við at tvær gróthústoftir vóru tiknar burtur niðri undir Ána bygd, var ein kvarnarsteinur funnin.
Tað kann tí hugsast at fleiri fornminnir kunnu finnast í økinum.

Ískoyti til byggisamtyktina.
Áðrenn grivið verður í lendi millum sjóðarmálan og landsvegin skal fornminnisransøkn verða gjørd í økinum til tess at tryggja at fornminnir ikki fara fyri skeyti.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til at taka undir við innkomnu viðmerkingini og innbyggja í byggisamtyktartekstin :

Áðrenn grivið verður í lendið millum sjóvarmálan og landsvegin skal fornminnisrannsøkn verða gjørd í økinum til tess at tryggja, at fornminnir ikki fara fyri skeyti
Samstundis verður mælt til, at áheitan verður send Fornminnamyndugleikunum um at fremja fornminnisrannsøkn av økinum.

Við omanfyrinevndu viðmerkingum verður mælt til at senda Heilsu- og Innlendismálaráðnum málið til góðkenningar.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. januar 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08. jan. 2019.

Havna- og Vinnunevndin 21. januar 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 8. jan. 2019.

Klaksvíkar Býráð 31. januar 2019
Tilmælini frá UBN og HaVN 21-01-2019 einmælt samtykt.

3/19
18/00451-5 Byggisamtykt - broyting í ásetingum fyri økispart A18 - kærufreist úti

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	21.01.2019	10/19
2 Klaksvíkar Býráð	31.01.2019	3/19

Frágreiðing um málið:
Byggisamtyktarbroytingin – samtykt á býráðsfundi 03.05.2018 - viðvíkandi økinum vestanfyri Oman Valrætt hevur nú ligið frammi til almenna hoyring. Kærufreistin var úti 21. november 2018.

Í kærutíðin hevur kommunan onga kæru/viðmerking móttikið

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til, at byggisamtyktarboytingin nú verður send Heilsu- og Innlendismálaráðnum til góðkenningar.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. januar 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 8. jan. 2019.

Klaksvíkar Býráð 31. januar 2019
Tilmælið frá UBN 21-01-2019 einmælt samtykt.

4/19
18/00556-15 Byggisamtykt - íbúðargrundøkisvídd í økisparti A18 - kærufreist úti

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	21.01.2019	11/19
2 Klaksvíkar Býráð	31.01.2019	4/19

Frágreiðing um málið:
Byggisamtyktarbroytingin – samtykt á býráðsfundi 31.05.2018 – viðvíkandi minst loyvdu grundøkjavídd í økisparti A18 hevur nú ligið frammi til almenna hoyring. Kærufreistin var úti 21. november 2018.

Í kærutíðin hevur kommunan onga kæru/viðmerking móttikið

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til, at málið nú verður nú sent Heilsu- og Innlendismálaráðnum til góðkenningar.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. januar 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 8. jan. 2019.

Klaksvíkar Býráð 31. januar 2019
Tilmælið frá UBN 21-01-2019 einmælt samtykt.

5/19
18/00649-10 Byggisamtykt - økismark flutt millum A18 og B9 - kærufreist úti

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	21.01.2019	12/19
2 Havna- og Vinnunevndin	21.01.2019	2/19
3 Klaksvíkar Býráð	31.01.2019	5/19

Frágreiðing um málið:

Byggisamtyktarbroytingin – samtykt á býráðsfundi 21.06.2018 – viðvíkjandi flyting av økismarki millum A18 og B9 á Kósini hevur ligið frammi til almenna hoyring. Kærufreistin var úti 21. november 2018.

Í kærutíðin hevur kommunan onga kæru/viðmerking móttikið

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til, at málið nú verður nú sent Heilsu- og Innlendismálaráðnum til góðkenningar.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. januar 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11. jan. 2019.

Havna- og Vinnunevndin 21. januar 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11. jan. 2019.

Klaksvíkar Býráð 31. januar 2019
Tilmælini frá UBN og HaVN 21-01-2019 einmælt samtykt.

6/19
18/01017-5 Byggisamtykt - reguleringar av økinum undir Fossum - kærufreist úti

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	21.01.2019	13/19
2 Klaksvíkar Býráð	31.01.2019	6/19

Frágreiðing um málið:
Byggisamtyktarbroytingin – samtykt á býráðsfundi 04.10.2018 – viðvíkjandi økinum á Fossum hevur ligið frammi til almenna hoyring. Kærufreistin var úti 21. november 2018.

Í kærutíðin hevur kommunan onga kæru/viðmerking móttikið

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til, at málið nú verður sent Heilsu- og Innlendismálaráðnum til góðkenningar.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. januar 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11. jan. 2019.

Klaksvíkar Býráð 31. januar 2019
Tilmælið frá UBN 21-01-2019 einmælt samtykt.

7/19
18/01337-2 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 968a í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	21.01.2019	17/19
2 Havna- og Vinnunevndin	21.01.2019	K-2/19
3 Klaksvíkar Býráð	31.01.2019	7/19

Frágreiðing um málið:
Víst verður til umsókn um sundurbýti dagf. 29.11.2018.
Byggisamtyktarliga liggur matr.nr. 968a í tveimum ymiskum økispørtum: A18 (blandað íbúðar- og vinnuendamál og D21 (grønt øki)
Umsóknin snýr seg um at býta partin í økisparti D21 frá restini av ognini. Orsøkin til sundurbýtið er ætlað søla av partinum niðanfyri landsvegin



Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Byggisamtyktarliga er onki til hindurs fyri sundurbýti, og mælir Tekniska Fyrisiting tí til at viðmæla sundurbýti. Lendið liggur framvið landsveg, og eigur málið tí eisini at verða sent Landsverk til ummælis.

Umhvørvis- og byarskipanarnevndin 21. januar 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 14. jan. 2019.

Havna- og Vinnunevndin 21. januar 2019
Málið verið til kunning.

Klaksvíkar Býráð 31. januar 2019
Tilmælið frá UBN 21-01-2019 einmælt samtykt.

8/19
19/00100-2 Umsókn um marknaumskipan Oman Reyðhús - matr.nr. 205d og 205e

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	21.01.2019	22/19	19/00100-2
2 Klaksvíkar Býráð	31.01.2019	8/19	19/00100-2

Frágreiðing um málið:
Í umsókn móttikin 15.01.2019 søkja eigaranir av matr.nr. 205d og 205e um marknaumskipan, soleiðis at uml. 70 m^2 verða fluttir frá matr.nr. 205d til matr.nr. 205e. Endamálið við umskipanini er bilhúsabygging.

Lógargrundarlag:

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til at viðmæla umsóknini

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. januar 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15. jan. 2019.

Klaksvíkar Býráð 31. januar 2019
Tilmælið frá UBN 21-01-2019 einmælt samtykt.